


www.oljan.fo

**Jan Müller** 15 - 04 - 2013

# Løgmaður til Grønlands at kunna seg um olju- og ráevnisvinnu

Í dag, mánadagin 15. apríl fer løgmaður, Kaj Leo Holm Johannesen á vinnuferð til Grønlands, har hann saman við umleið 50 øðrum umboðum fyri myndugleikar og vinnulív fer at kunna seg við framtíðar møguleikarnar á eitt nú olju- og ráevnisøkinum í Grønlandi. Týsdagin 16. apríl setur løgmaður eitt vinnu seminar í mentanarhúsinum Katuaq í Nuuk fyri grønlendsk og føroysk vinnulívsfólk. Vinnuhúsið og Grønlendska arbeiðsgevarafelagið skipa fyri seminarinum. Hósdagin 18. apríl skal løgmaður á fund við vinnumálaráðharran, Jens-Erik Kirkegaard og Miiti Lynge, ráðharri fyri bústaðir, náttúru og umhvørvið, og varaforkvinna í Naalakkersuisut. Á ferðini vitjar løgmaður eisini grønlendskar fyritøkur. Løgmaður verður aftur í Føroyum fríggjadagin 19. apríl.